Kappingareftirlitið

Mark T. Højgaard, Skrásettur grannskoðari
Dalabøur 18
480 Skáli

**Tórshavn**, 21. desember 2018

**Mál. nr.:** 18/00365

# Viðvíkjandi yvirtøkuni hjá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd

## 1. Samandráttur

Tann 13. november 2018 fekk Kappingareftirlitið fráboðan um, at P/F 01.11.2018 v. Sp/f Framherji, P/F Varðin og P/F Kimbil høvdu gjørt avtalu um keyp av øllum partapeninginum í P/F H-Dygd frá P/F Tváttá.

Fráboðanin var fullfíggjað tann 21. november 2018.

Talan er um yvirtøku, sum er fevnd av § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, og sum skal fráboðast sambært § 16, stk. 1, tí umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri tey mørk, sum eru ásett í § 14, stk. 1 í kappingarlógini.

Kappingareftirlitið hevur kannað yvirtøkuna, og er komið til ta niðurstøðu, at yvirtøkan hjá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd kann góðkennast.

Sambært § 15, stk. 5 í kappingarlógini, kann Kappingareftirlitið góðkenna eina yvirtøku, sum ikki forðar fyri virknari kapping, og har eingin tilsøgn hevur verið neyðug.

### 1.1. Avgerð

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5 í kappingarlógini gjørt av at góðkenna yvirtøkuna hjá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd, vísandi til § 15, stk. 2, nr. 1 í kappingarlógini. Sambært hesi áseting, skal ein yvirtøka, sum ikki forðar fyri virknari kapping, góðkennast.

## 2. Málslýsing

### 2.1. Inngangur

Kappingareftirlitið fekk tann 13. november 2018 fráboðan um, at P/F 01.11.2018 v. Sp/f Framherji, P/F Varðin og P/F Kimbil høvdu gjørt avtalu um keyp av øllum partapeninginum í P/F H-Dygd frá P/F Tváttá.

Fráboðanin var fullfíggjað tann 21. november 2018.

P/F H-Dygd selir og framleiðir vindeygu og hurðar til føroyska marknaðin. Størsti partur av framleiðsluni er til føroyska sethúsamarknaðin. Felagið hevur eisini fótað sær uttanlands seinastu tíðina.

Sp/f Framherji, P/F Varðin og P/F Kimbil eiga 1/3 hvør av partapeninginum í P/F 01.11.2018.

Sp/f Framherji og P/F Varðin eiga frammanundan yvirtøkuni hvør síni 50% í P/F Aluplast, sum partvíst virkar á sama marknaði sum P/F H-Dygd. P/F Kimbil hevur áður átt í P/F Aluplast.

Talan er um yvirtøku, sum er fevnd av § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, og sum skal fráboðast sambært § 16, stk. 1, tí umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri tey mørk, sum eru ásett í § 14, stk. 1 í kappingarlógini.

Í sambandi við at fráboðanin um yvirtøkuna varð almannakunngjørd, varð heitt á almenningin og vinnuna um at lata Kappingareftirlitinum møguligar viðmerkingar. Viðmerkingarnar frá vinnuni hava ikki ført við sær, at staðfest eru nøkur kappingarrættarlig ivamál viðvíkjandi yvirtøkuni.

### 2.2. Partarnir

#### 2.2.1. Sp/f Framherji

Felagið varð stovnað í 1991 og broytti navn til Sp/f Framherji í 2005.

Høvuðsvirksemið hjá konsernini er fiskiskapur.

Anfinn Olsen eigur [..] av Sp/f Framherji. Somuleiðis eigur Anfinn Olsen [..] av Sp/f Framinvest, sum eigur [..] av Sp/f Framherji.

Sp/f Framherji eigur og rekur nóta- og trolskipið M/S Fagraberg og M/S Høgaberg, sum fiska pelagisk fiskasløg og trola eftir svartkjafti.

Felagið eigur P/F Akraberg FD 10, sum áður æt P/F Vesturvón. P/F Akraberg FD 10, keypti í 2013 trolaran M/T Akraberg og seldi sama ár trolaran M/T Vesturvón.

Sp/f Framherji eigur P/F Regn, sum eigur og rekur línubátarnar M/S Stapin og Skørin.

Í 2015 keypti felagið allan partapeningin í P/F Eysturoy, sum eigur og rekur línubátarnar, Sigmundur og Mascot.

Sp/f Framherji eigur eisini 30 % av P/F Pelagos, 25 % av P/F Faroe Origin og 50% av P/F Aluplast, sum partvíst virkar á marknaðinum hjá P/F H-Dygd.

Sp/f Framherji eigur ikki í øðum feløgum, sum er í kapping við virksemið hjá P/F H-Dygd.

### 2.2.2. P/F Varðin

P/F Varðin varð stovnað í 1985, og vóru tað menn úr Gøtu, sum tóku stig til at byggja nóta- og trolbátin Trónd í Gøtu, sum var grundarsteinurin undir Varðanum.

P/F Varðin eigur í dag millum annað fleiri uppisjóvarskip og eitt nýmótans uppisjóvarvirkið á Tvøroyri, Varðan Pelagic.

Felagið eigur eisini í øðrum feløgum, men kjarnuvirksemið hjá samtakinum er skiparakstur av uppisjóvarskipum.

P/F Varðin eigur 50% av P/F Aluplast, sum partvís virkar á marknaðinum hjá P/F H-Dygd. P/F Varðin eigur ikki øðrum feløgum, sum kappast við P/F H-Dygd.

Í P/F Varðin eru fleiri persónligir parteigarar, men eingin meiriluta eigari.

### 2.2.3. P/f Kimbil

P/F Kimbil A/S varð stovnað í 1938, og var endamál felagsins at eiga og reka fiskiskip.

Í 1997 varð navnið á felagnum broytt til P/F Kimbil, og hevur felagið seinastu árini virkað sum íløgufelag.

Poul Hansen eigur [..] av Sp/f Coldstream, sum eigur [..] av P/F Kimbil.

P/F Kimbil eigur [..] av partapeninginum í Sp/f Gl. Kgl. Handilin, [..] av partapeninginum í P/F Egilsgarður og [..] av partapeninginum í P/F Uppisjóvarhavnin.

P/F Kimbil hevur áður átt í P/F Aluplast, men eigur í dag ikki í feløgum, sum kappast við P/F H-Dygd.

### 2.2.4. P/F H-Dygd

P/F Føroya Gluggi varð stovnað í 1985 og broytti felagið navn til P/F H-Dygd í 2009. Endamál felagsins er at reka handil, handverk, ídnað og aðra vinnu í hesum sambandi.

Í 2008 løgdu P/F Føroya Gluggi og Sp/f Vatnsoyra Snikkaravirkið saman. Í 2009 løgdu P/F H-Dygd og P/F 278 saman.

Tað er P/F Tváttá, sum undan yvirtøkuni eigur [..] av partapeninginum í P/F H-Dygd.

P/F H-Dygd hevur virksemi innan sølu, framleiðslu og montering av vindeygum og hurðum til føroyska marknaðin. Sambært fráboðara, hevur felagið eisini fóta sær uttanlands seinastu tíðina.

Sambært fráboðara, er virksemið hjá P/F H-Dygd vaksið nógv seinastu árini, og eru stórar íløgur gjørdar í millum annað framkomna maskinpark í Miðvági.

Størsti partur av framleiðsluni hjá P/F H-Dygd er til føroyska sethúsamarknaðin við træ og plast vindeygum og hurðum. Á sethúsmarknaðinum er eisini nakað av framleiðslu við træ/alu vindeygum.

P/F H-Dygd framleiðir í minni mun aluminium vindeygum, hurðar og fasadur til vinnukundamarknaðin.

Í mun til kappingarneytarnar, sum í stóran mun innflyta liðugt framleidd vindeygu, hurðar og fasadur, fer øll framleiðslan hjá P/F H-Dygd fram í Føroyum.

P/F H-Dygd hevur ikki annað virksemi, sum er í kapping við virksemið hjá Sp/f Framherji, P/F Varðin ella P/F Kimbil.

## 2.3. Transaktiónin

Keypararnir hava stovnað felagið P/F 01.11.2018, sum keypir 100% av partapeninginum í P/F H-Dygd frá P/F Tváttá grundað á tær treytir, sum eru sambært keypssáttmála millum P/F 01.11.2018 øðrumegin og P/F Tváttá, hinumegin.

Keypti partapeningurin hevur eitt nominelt virði uppá [..] og verður keyptur fyri [..] kr. Harumframt verður keypt frá P/F Tváttá føstogn á Langsandi fyri [..] kr.

Samlaði keypsprísurin er sostatt [..] kr.

Sp/f Framherji, P/F Varðin og P/F Kimbil eiga 1/3 hvør í P/F 01.11.2018, sum keypir 100% av partapeninginum í P/F H-Dygd frá P/F Tváttá. Sambært viðtøkum fyri P/F 01.11.2018 er talan um felags ræði.

Yvirtøkan hjá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd hevur við sær, at ræðið á P/F H-Dygd verður broytt, og tí er talan um eina yvirtøku, sbrt. §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini.

## 2.4. Fráboðanarskylda

Tá ið metast skal um ein yvirtøka nær tey markvirðir fyri umsetning, sum eru at finna í §14, stk. 1 í kappingarlógini, verður støðið tikið í umsetninginum hjá samtakinum, sum luttakandi fyritøkurnar, hvør sær eru partar av.

Luttakandi fyritøkurnar í sambandi við hesa yvirtøku eru Sp/f Framherji, P/F Varðin og P/F Kimbil sum keypari, og P/F H-Dygd sum fyritøkan, ið verður yvirtikin.

Fráboðanarskyldan í §16, stk. 1 í kappingarlógini fevnir um tær samanleggingar, yvirtøkur og samváðar, sum eru fevndar av §13, stk. 1 ella 2, og har umsetningsmørkini í §14, stk. 1, pkt. 1 ella pkt. 2 eru nádd.

Kappingareftirlitið hevur í sambandi við hesa yvirtøku staðfest, at umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri 75 mió. kr., og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hava ein umsetning sum liggur omanfyri 15 mió. kr. í Føroyum.

Talan er sostatt um eina yvirtøku, sum kemur undir fráboðanarskylduna í §16, stk. 1 í kappingarlógini.

# 3. Marknaðarlýsing

Gongd er í føroyska búskapinum. Arbeiðsloysið er lágt, og útgjaldið av lønum er vaksandi. Í byggivinnuni hevur eisini verið framgongd seinnu árini millum annað grundað á fleiri almennar og privatar byggiverkætlanir.

Sambært tølum frá Hagstovuni, er innflutningurin av lidnum vindeygum og hurðum úr træi vaksin 20% í tíðarskeiðinum frá 2015-2017. Tøl frá Hagstovuni vísa eisini, at innflutningurin av lidnum vindeygum og hurðum úr plasti er vaksin 11% sama tíðarskeið. Sambært tølum frá Hagstovuni, hevur

innflutningurin av vindeygum, hurðum og fasadum úr aluminium verður støðugur í tíðarskeiðinum frá 2015-2017.

Tølini frá Hagstovuni, skulu tó takast við fyrivarni, tí ávís framleiðsla av vindeygu, hurðum og fasadum er í Føroyum. Fráboðari metir, at samlaði umsetningurin í sambandi við sølu av vindeygum, hurðum og fasadum til føroyska marknaðin var [..] mió. kr. í 2017.[1]

P/F H-Dygd hevur virksemi innan sølu, framleiðslu og montering av vindeygu og hurðum til føroyska marknaðinum. Høvuðsparturin av framleiðsluni er vindeygu og hurðar úr træ og plasti til føroyska sethúsamarknaðin. Eisini er nakað av framleiðslu av træ/alu vindeygum og hurðum til føroyska sethúsamarknaðin. Minni partur av framleiðsluni eru vindeygu, hurðar og fasadur úr aluminium til vinnukundamarkaðin.

Í mun til kappingarneytarnar, sum í høvuðsheitum innflyta liðugt framleidd vindeygu, hurðar og fasadur, framleiðir P/F H-Dygd sínar vørur í Føroyum. Sambært fráboðara, hava P/F Aluplast og ávís snikkaravirkir eisini framleiðslu í Føroyum.

Á føroyska marknaðinum fyri sølu av vindeygum, hurðum og fasadum er fleiri veitarar. Talan er um ein opnan marknað, har gáttin til marknaðin er lág.

Umframt flestu timburhandlar og byggibúðir í Føroyum, so eru fleiri smærri fyritøkur, sum selja útlendsk vindeygu, hurðar og fasadur. Størru byggifyritøkurnar innflyta eisini í ávísan mun í samband við størri byggiverkætlanir, eins væl sum privatfólk hava møguleika at innflyta vindeygu og hurðar í sambandi við sethúsabygging ella umvælingar.

Keypararnir á marknaðinum eru eisini ymiskir. Á sethúsamarknaðinum er talan í høvuðsheitum um eingangsveitingar til privat kundar, tó so, at byggifyritøkur kunnu vera afturvendandi. Mett verður, at støðan á vinnukundamarknaðinum er hin sama.

Í sambandi við almannakunngerð av yvirtøkuni varð heitt á kappingarneytar um at koma við møguligum viðmerkingum til yvirtøkuna. Samanumtikið kann sigast, at kappingarneytarnir, ið hava vent sær til Kappingareftirlitið, og teir aktørar, sum Kappingareftirlitið hevur verið í samband við, ikki meta, at yvirtøkan hjá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd kemur at skeikla kappingina. Hinvegin verður mett, at yvirtøkan kann stimbra kappingina á marknaðinum.

Samanumtikið er talan um ein marknað við fleiri aktørum, har marknaðaratgongdin er góð, og har føroyski keyparin hevur møguleika at velja føroyskan ella útlendskan veitara.

## 4. Meting

Í §15, stk. 2 í kappingarlógini er ásett metingarstøði, sum skal brúkast í sambandi við viðgerð av eini yvirtøku:

> "Stk. 2. Ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal góðkennast. Ein samanlegging, sum

[1] Íseting er ikki íroknað samlaða umsetningin fyri 2017.

munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal forbjóðast."

Ásetingin sigur, at um ein samanlegging munandi forðar fyri virknari kapping, uttan mun til hvat orsøkin er, so skal hon forbjóðast. Talan er um tí sokallaðu SIEC-testina, (Significant Impediment of Effective Competition), ið heimilar kappingarmyndugleikanum at forbjóða samanleggingum sum av eini ella aðrari orsøk kunnu forða fyri virknari kapping, eisini hóast tær ikki skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu. Til dømis um talið av fyritøkum á marknaðinum longu er avmarkað, og umstøðurnar fyri tigandi samskipan eru tilstaðar.

Fyri at meta um ein samanlegging kann munandi forða fyri virknari kapping, er neyðugt at skilmarka teir viðkomandi marknaðir, sum samanleggingin kann hava ávirkan á.

## 4.1. Skilmarking av viðkomandi marknaði

Tá metast skal um í hvønn mun ein yvirtøka kann avmarka kappingina á marknaðinum, er neyðugt at skilmarka tann marknað, sum yvirtøkan fær ávirkan á.

Í §5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði. Hetta er fyri at staðfesta í hvønn mun fyritøkan er undir kappingarligum trýsti. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varasetingin í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping skal kannast, um tað er neyðugt. Somuleiðis skal ásetingin skiljast soleiðis, at varaseting skal kannast undir øllum umstøðum, men at aðrir hættir eisini kunnu brúkast.

Í sambandi við skilmarkingina av viðkomandi marknaði, skal bæði viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður staðfestast. Hetta merkir, at kanningin skal staðfesta, um tað eru aðrar vørur á marknaðinum, sum kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum partarnir veita, somuleiðis skal tann landafrøðiliga støddin á marknaðinum staðfestast. Landafrøðiligi marknaðurin er tað øki, har partarnir umseta ella avtaka vørur og har kappingarligu umstøðurnar eru líkar, og sum líkjast frá teimum, sum eru í grannaøkjum.

### 4.1.1. Viðkomandi vørumarknaður

Kappingareftirlitið metir, at talan er um tveir viðkomandi vørumarknaðir. Hesir eru sethúsamarknaðurin við træ og plastikk vindeygum og hurðum[2], og vinnukundamarknaðurin við alu vindeygum, hurðum og fasadum.

#### 4.1.1.1. Sethúsamarknaðurin við træ og plastikk vindeygum og hurðum

Í sambandi við sølu av vindeygum og hurðum úr træi og plasti til føroyska sethúsamarknaðin, metir Kappingareftirlitið ikki, at vindeygu og hurðar úr aluminium kunnu varasetast í mun sølu av vindeygu og hurðum úr plastikk ella træ. Talan er um vørur, har stórur munur er á prísinum, og har ein

[2] Vindeygu og hurðar úr træ/alu er partur av hesum marknaði.

príshækking á 5-10% frá einum hypotetiskum monopolisti, sum selir plastikk og træ vindeygu og hurðar, ikki vildi havt við sær, at keyparin valdi aluminium vindeygu og hurðar ístaðin.

Síggjast skal tó ikki burtur frá, at vindeygu og hurðar úr aluminium í ávísum førum verða seld til sethúsakundar í Føroyum. Kappingareftirlitið hevur fingið upplýst frá vinnurekandi, at talan er um eina avmarkaða nøgd, og at talan oftast er um serframleidd vindeygu og hurðar.

Sambært fráboðara, er skifti millum plast og træ ein spurningur um hugburð, meðan skiftið frá aluminium til træ ella plast ikki er vanligt.

Kappingareftirlitið metir tí, at viðkomandi vørumarknaðurin er sethúsamarknaðurin við træ og plast vindeygum og hurðum.

Á marknaðinum finnast fleiri seljarar og keyparar.

Millum seljararnar kunnu nevnast: Balslev, Borg, Tórshavar Timburhandil, Sandavágs Timburhandil, Import, Vind, Aluplast, Havnar Træsmiðja, og Snikkaravirkið PDR. Á keyparar síðuni eru í høvuðsheitum sethúsaeigarar og byggifyritøkur.

Fráboðari metir, at samlaði umsetningurin fyri sølu av vindeygum og hurðum til føroyska sethúsamarknaðin var áleið **[..]** mió. kr. í 2017.

Sambært fráboðara, er marknaðarparturin hjá P/F H-Dygd **[30-40]** %, meðan marknaðarparturin hjá P/F Aluplast er **[0-5]** %. P/F H-Dygd og P/F Aluplast hava sostatt líka niðanfyri **[30-40]** % av samlaða umsetninginum á sethúsamarknaðinum í Føroyum.

Yvirtøkan merkir, at talan er um lutfalsliga lítla hækking av marknaðarpartinum hjá P/F H-Dygd á viðkomandi marknaði, um P/F H-Dygd og P/F Aluplast verður mett undir einum. Økta miðsavningin verður **[0-5]** %.

Marknaðarpartarnir hjá tveimum av størstu kappingarneytunum liggja millum 10-20% av marknaðinum, hvør. Á marknaðinum er eisini fleiri smærri kappingarneytar.

### 4.1.1.2. Vinnukundamarknaðurin við alu vindeygum, hurðum og fasadum

Í sambandi við sølu av vindeygum, hurðum og fasadum úr aluminium, er talan um sølu til vinnukundamarknaðin burturav. Kappingareftirlitið metir ikki, at tað eru aðrar vørur, sum kunnu varasetast fyri hesa vøru.

Kappingareftirlitið metir tí, at viðkomandi vørumarknaðurin er søla av vindeygum, hurðum og fasadum til vinnukundamarknaðin.

P/F Aluplast er størsti framleiðari á hesum marknaði í Føroyum. P/F H-Dygd hevur avmarkaða framleiðslu á hesum marknaði. Talan er annars um útlendskar veitarar.

Í tølum frá Hagstovuni sæst, innflutningurin á vindeygum, hurðum og fasadum til vinnukundamarknaðin var áleið 59% av marknaðinum í 2017.

Fráboðari metir, at samlaði umsetningurin fyri sølu av vindeygum, hurðum og fasadum til føroyska vinnumarknaðin var áleið **[..]** mió. kr. í 2017.

Fráboðari metir, at marknaðarparturin hjá P/F H-Dygd á viðkomandi marknaði er [5-10] %, meðan marknaðarparturin hjá P/F Aluplast er [30-40] %. P/F H-Dygd og P/F Aluplast hava sostatt [30-40] % av samlaða umsetninginum á viðkomandi vørumarknaði, um fyritøkurnar verða mettar undir einum. Yvirtøkan merkir, at miðsavningin verður økt [5-10] %.

Á marknaðinum finnast fleiri seljarar og keyparar.

Millum seljararnar kunnu nevnast: Aluplast, H-Dygd, Balslev, Borg, Tórshavar Timburhandil, Sandavágs Timburhandil, Import. Harumframt innflyta byggifyritøkur í summum førum beinleiðis frá framleiðara í sambandi við byggiverkætlanir.

Á keyparasíðuni kunnu nevnast: Størru byggifyritøkurnar umframt almenna geiran.

Marknaðarpartarnir hjá tveimum av størstu kappingarneytunum liggja millum 10-20% av marknaðinum, hvør. Á marknaðinum er eisini fleiri smærri kappingarneytar.

### 4.1.2. Viðkomandi landafrøðiligi marknaður

Kappingareftirlitið metir, at landafrøðiligi marknaðurin fyri báðar viðkomandi marknaðir er Føroyar.

### 4.1.3. Ávegis niðurstøða

Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan hjá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd fer at hava stórvegis ávirkan á marknaðin fyri træ/plast vindeygu og hurðar til føroyska sethúsamarknaðin.

Í fyrsta lagi, so umskarast virksemið hjá P/F H-Dygd og P/F Aluplast lutfalsliga lítið á hesum marknaði. Um fyritøkurnar verða mettar undir einum, er talan um eina økta miðsavning uppá [0-5] %.

Í øðrum lagi, er gáttin inn á henda marknað lág. Sambært vinnuni fylgir mongdin av veitarum búskaparligu gongdini. Sambært vinnuni, er eisini talan um ein marknað, har kappingin um kundarnar er hørð við útlendskar veitarar.

Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan frá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd, fer at hava stórvegis ávirkan á marknaðin fyri sølu av vindeygum, hurðum og fasadum úr aluminium til vinnukundamarknaðin.

Í fyrsta lagi so umskarast virksemið hjá P/F H-Dygd og P/F Aluplast lutfalsliga lítið. Um fyritøkurnar verða mettar undir einum, er talan um eina økta miðsavning uppá [5-10] %.

Í øðrum lagi er gáttin inn á henda marknað lág. Tøl frá Hagstovuni vísa at ein rættuliga stórur partur av eftirspurninginum verður nøktaður av innfluttum vørum.

Fyri báðar marknaðir er galdandi, at Føroyar er ein marknaður.

## 4.2. Kappingarrættarlig meting

Tað eru yvirskipað trý sløg av yvirtøkum. Hesar eru vatnrættar, t.e. millum fyritøkur á sama marknaði, loddrættar, t.e. millum veitarar og avtakarar, og síðani konglomeratar, t.e. har fyritøkurnar hvørki hava loddrøtt ella vatnrøtt sambond av týdningi.

Kappingareftirlitið

Yvirtøkan av P/F H-dygd er í grundini ein konglomerat yvirtøka, tí tann eigaraskarin, sum er handan yvirtøkuna, hevur ikki nakað virksemi, sum umskarar virksemi hjá P/F H-dygd av týdningi. Tó er galdandi at tveir av trimum eigarum eiga annað felag, sum í avmarkandi mun hevur virksemi, ið er í kapping við P/F H-dygd.

Bæði P/F H-Dygd og P/F Aluplast, sum tveir av keyparunum eiga, sita á einum lutfallsligum stórum marknaðarparti, men hesir eru á hvør sínum vørumarknaði. Yvirtøkan førir til eina avmarkað øking av miðsavningini á hesum marknaðum.

Kappingareftirlitið metir tískil ikki, at marknaðarlutirnir hjá P/F H-Dygd og P/F Aluplast koma at hava ávirkan á, hvussu marknaðurin fer at háttast framyvir.

Hóast fyritøkurnar sita á lutfallsliga stórum parti av marknaðinum, so hevur raksturin hjá P/F Aluplast verið tungur, og her skal leggjast afturat, at hetta er í eini tíð, har nógv nýbyggjarí hevur verið í Føroyum.

Kappingareftirlitið metir samanumtikið, at yvirtøkan ikki fer at hava neiliga ávirkan á kappingina. Hetta er eisini generella fatanin hjá vinnuni. Afturat hesum er atgongdin til marknaðirnar góð - stórur partur av útboðnum kemur frá innfluttum vørum – antin beinleiðis frá útlendsku veitarum ella umvegis føroysk søluumboð.

Kappingareftirlitið metir tí, at yvirtøkan kann styrkja um kappingina á viðkomandi marknaðum, keyparunum at gagni.

## 5. Niðurstøða

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5 í kappingarlógini avgjørt at góðkenna yvirtøkuna hjá P/F 01.11.2018 av P/F H-Dygd, vísandi til § 15, stk. 2, nr. 1 í kappingarlógini. Sambært hesi áseting, skal ein yvirtøka, sum ikki forðar fyri virknari kapping, góðkennast.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Rúni J. Niclassen
Fulltrúi